# Per Høyer Hansen farin

**Fríggjadagin andaðist ein best umtókti og mest avhildni ítróttaskrivarin í Danmark. Per Høyer Hansen gjørdist 59 ár**

MINNINGARORÐ
*Jákup Mørk*

Tað er kanska ikki so vanligt, at eini deyðsboð um ein útlendskan blaðmann verða borin so ofta í føroysku loftmiðlunum, sum tey vórðu fríggjadagin, tá deyðsboðini bórust um Per Høyer Hansen.

Lat tað eisini verða sagt beinanvegin, at Per Høyer Hansen heldur ikki var nakar vanligur blaðmaður.

## Eisini fyri føroyingar

Hann man hava verið ein hin best umtókti ítróttaskrivarin í danskari blaðsøgu, og ikki minst munnu ítróttaáhugaðir føroyingar kenna skriving hansara frá Tipsblaðnum, har hann í mong ár var fastur skrivari til m.a. landsdystir og aðrar stórar fótbóltshendingar. Aloftast beinrakin í skriving sínari. Ofta við einum farra av provokatión, men ongantíð provokerandi uttan orsøk.

Frá einum føroyskum sjónarhornið er eisini áhugavert, at Per Høyer Hansen fram um aðrar var tann, sum gjørdi danir varugar við føroyska fótbóltslandsliðið. Ikki altíð fall hetta í góða jørð, sum ta ferðina hann sammettið føroyska landsliðið við eitt danskt 3. deildarlið. Nakað sum eisini fekk øði í onkran føroyskan ítróttaskrivara. Til stuttleikar kann eisini nevnast her, at hann, eftir at hava sæð føroyska landsliðið ta einu ferðina segði, at ein ávísur Todi Jónsson ivaleyst kundi gera seg galdandi uttanlands, og enn í dag er Tipsblaðið einasti danski miðilin, sum skrivar Jónsson og ikki Jönsson. Sama við Jákup Mikkelsen, sum aðra staðni verður nevndur Jákub. Hetta bert sum dømi um, hvussu væl hann aloftast setti seg inn í tað, sum hann tókst við.

## Høgt virdur

Per Høyer Hansen var útbúgvin cand,jur og journalist, og varð 1963 settur í starv hjá Ritzau. Frá 1967 til 1978 starvaðist hann hjá Information, har hann tókst við uttanríkispolitikk og ítrótt, og síðani hetta hevur hann verið fastur fúsur hjá Tipsblaðnum.

Umframt at vera væl lýddur millum fótbóltsáhugað, so hevur skriving hansara eisini vakt ans í aðrar mátar. Hann er higartil einasti ítróttaskrivari, sum hevur fingið donsku publicist.-virðislønina, og har umframt hevur hann eisini fingið gylta pennin, sum á hvørjum ári verður latin einum ítróttaskrivara. Eisini kann nevnast, at hann ígjøgnum nógv ár var danska umboðið, tá besti fótbóltsleikarin í Europa skuldi kjósast. Eitt val, sum verður fyriskipað av France Football, og har ein ítróttaskrivari úr hvørjum landi sleppur at atkvøða.

Afturat blaðskrivingini hevur hann eisini givið út fleiri bøkur. Teirra millum ein við hugleiðingum um mest minnisríku dystirnir, sum hann í 24 ára longu yrkisleiðini innan fótbóltsskriving hevur sæð. Eisini her eiga Føroyar sítt pláss, tí millum seks HM- og fimm EM-endaspæl, hevur hann eisini funnið pláss til hin 12. september í 1990.

Umframt at hava skrivað um landsdystir og annan altjóða fótbólt, eru eisini mong av teirri fatan, at tað hevur verið Per Høyer Hansen, sum hevur ført pennin hjá heldur ótraditionella pensionistinum, Tavse Tipper Thomsen, sum hvørja viku eigur sín teig í Tipsblaðnum. Hetta hevur áður verið avsannað av blaðstjóranum á blaðnum, men nú fæst helst at vita, um hetta er so ella ikki.

Thomsen ella ikki, so er púra vist, at tað verður saknur í serstaka pennahaldinum hjá Per Høyer Hansen. Eisini her á landi.



*Eingin ivi er um, at danski blaðheimurin hevur mist ein av allarbestu ítróttaskrivarunum, nú Per Høyer Hansen er farin*

# Marathon-vika hjá VB

**Ein dystur varð leiktur í bestu kvinnudeildini um vikuskiftið, tá VB vitjaði Neistan í Havn. Hetta var samstundis endin á eini strævnari viku hjá teimum úr Vági**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

VB setti punktum fyri eini sera strævnari viku, tá tær sunnudagin spældu dyst í Havn móti Neistanum. Eina viku, har vágsgenturnar nærum vóru meginpartin av tíðini úr heimbygdini, tí tað ikki var gjørligt at fáa allar dystirnar avgreiddar fylgjandi dagar.

## Gekk væl

Nú spældi alt kortini væl av hjá VB, og einki er at ivast í, at tær er fegnar um, at so bleiv.

Teir tríggir dystirnir góvu fult stigatal í landskappingini, har VB nú hevur drigið frá Kyndli og Neistanum, tó at VÍF og Stjørnan enn liggja dekan ov langt frammi, og harumframt er plássið í hálvfinaluni í Coca-Cola kappingini eisini tryggjað.

Í hesari skulu tær annars hitta Stjørnuna, sum sostatt fær fleiri fylgjandi dystir móti VB, og einki er at ivast í, at áskoðararnir í hesum dystum fáa fleiri áugaverdar uppgerðir.

## Eingin ivi

Móti Neistanum var tað VB, sum var á odda at kalla allan dystin. Munurin í fyrra hálvleiki kom onkuntíð upp í eini fýra mál, men Neistin fekk kortini minkað um, soleiðis at bert tvey mál skildu partarnar í steðginum.

Seinna umfarið øktu gestirnir skjótt, og í vanda kom sigurin ongantíð. Heldur var líkt til, at talan skuldi gerast um stórtap, tá VB brádliga økti úr fimm upp í 10 mál, men seinastu minuttirnar hildu gestirnir uppat við at skora, so Neistin aftur fekk pyntað um.

## Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
*Neistin:* Birita Wardum 6, Annika Thomsen 5, Súna Mørk 2, Mildrid Jacobsen 2, Ata Høgnadóttir 2

*VB:* Gurið Mortensen 7(3), Regina Radó 7(2), Andrea Lütz 5, Eyðbritt Krosslá 2, Mary Krosslá 1, Christina Holm 1, Sólrun Krosslá 1

**Brotskøst:**
VB 6

**Útvísingar:**
Neistin 3, VB 1

**Dómarar úr Tjaldri:**
Dánial Hansen
og Kári Hansen



*Eingin ivi tóktist vera um úrslitið, tá Neistin og VB hittust sunnudagin*

## Støðan 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | VÍF | 11 | 10 | - | 1 | - | 0 | 334 | 181 | 153 | 21 |
| 2. | Stjørnan | 11 | 9 | - | 1 | - | 1 | 309 | 234 | 75 | 19 |
| 3. | VB | 9 | 6 | - | 0 | - | 3 | 249 | 185 | 64 | 12 |
| 4. | Kyndil | 11 | 5 | - | 0 | - | 6 | 253 | 293 | -40 | 10 |
| 5. | Neistin | 10 | 4 | - | 0 | - | 6 | 209 | 227 | -18 | 8 |
| 6. | Sóljan | 12 | 1 | - | 1 | - | 10 | 218 | 319 | -101 | 3 |
| 7. | Tjaldur | 10 | 0 | - | 1 | - | 9 | 158 | 291 | -133 | 1 |



VIÐMERKINGAR

# Tíðindaflutningur ella Jólaskemt hjá Útvarpi Føroya – ella?

**Marjus Dam,**
*Løgtingsmaður*

Útvarp Føroya hevði ikki sørt skemtilig tíðindi at bera mær og føroyingum annars á middegi fríggjadagin tann 22.12.00: Marjus Dam, løgtingsmaður hjá Sambandsflokkinum var orsøkin til, at benzinprísirnir ikki lækkaðu. Makan til tíðindaskemt og tvætl havi eg ikki hoyrt áður!

Tað var lovað mær, at hesi tíðindir skuldu berast fram av nýggjum, uttan skemt, soleiðis at veruligu viðurskiftini komu fram, men mær vitandi er onki hent enn. Hetta er ov álvarsamt at skemtast um!

Álvaratos, hvør atkvøddi ja fyri uppskotinum og hvør atkvøddi nei. Og ikki minst hvør atkvøddi blankt og feldi uppskotið?

Ein av ídnastu løgtingsmonnum fyri at lækka um skattir og avgjøld er nevniliga Marjus Dam, um eg sjálvur skal siga tað. Ikki bert í orðum, men sanniliga í verki. Hvat hendi veruliga:

Tað, ið hendi á Føroya Løgtingi var,
– øll andstsøðan atkvøddi fyri at lække benzinprísirnar
– at **tjóðveldisflokkurin og sjálvstýrisflokkurin atkvøddu nei til at lækka bensinprísirnar**

Hvat gjørdi Fólkaflokkurin – hesin flokkur, sum av røttum og í tíð og ótíð gremur seg óført um, at avgjøld og benzinrprísir eru ov høgir. Tað kom eisini greitt fram. Allur fólkaflokkurin segði nei til at lækka bensinprísirnar. Óli Breckmann sat og lúrdi og atkvøddu blankt. Tæu fall uppskotið. Tað skal Marjus Dam ikki hava skyldina av. Tí tað var ikki undirritaði, ið trýsti á atkvøðuknøttin hjá Óla Breckmann og hinum hjá fólkaflokkinum ið noktaðu at lætta um hjá føroyingum á hesum øki.

Var tað fólkaflokkurin ið vildi lækka um prísin? ikki í verki. Tá søgdu teir nei. Tí eru orð fólkafloksins ofta lítið verd. Vit gevast ikki:

Benzinavgjaldið skal niður

Brennioljuavgjaldið skal niður

Uppskot um hesi viðurskiftir fer aftur at verða lagt fram á Føroya Løgting. Men um tað verður samtykt er so upp til samgonguna. Møguliga halda teir fram við at trælka føroyingin við tungum avgjøldum framyvir. Møguliga gerast Óli Breckmann og aðrir Fólkafloksmenn so illa fyri, at teir ikki fá møtt upp, tá atkvøðast skal til 2. og 3. Viðgerð. Tá er vón um, at føroyingar koma at fáa ein skattalætta. Tí so leingi teir sita har í salinum í samgongu verður skattaskrúan bert tátta og tað í ólukkumát. Tað merkir hvør einasti føroyingur á egnum rivnum skinni ídag.

Vit hava sjálvir lagt uppskot um at hjálpa føroyingum nú landskassin flýtur yvir orsaka av risa avgjøldum sum eisini koma av, at prísurin á hesum vørum at hækkaður á heimsmarknaðinum.

Samgongan pínir føroyingin, og Fólkaflokkurin lumpar veljaran:

Avgjøldini gera, at hvør einasti føroyingur nú kennir seg nívdan og píndan til jarðar orsaka av hesum skammiliga høgu gjøldunum. Vit høvdu roknaðu við, at **fólkaflokkurin**, ið hevur nýtt nógva tíð og orku uppá at **tosa um at** lække skattin fór at stuðla hesum sera lítla falli í benzin prísum **í verki**. Men nei. Aftur hesaferð upplivdu føroyingar, at Fólkaflokkurin tosar um at lækka avgjøld, fyri at lumpa og fáa atkvøður veljarans, men tá ið á stendur, so atkvøða so nógvir fólkafloksmenn ímóti lættum, at uppskotini fella. So kann onkur fólkafloksmaður, sum í hesum føri Óli Breckmann, spæla frí við at atkvøða blankt. Úrslitið er so tað, at benzinprísirnir ikki lækka nú. Orsaka av Fólkaflokkinum og hinum samgonguflokkunum.

Men eitt er púra greitt: Líknandi uppskot fer at verða lagt fram aftur, og tá fer Sambandsflokkurin sjálvandi aftur at taka undir við at lætta har vit meta at tað er rímiligt – sum við benzinprísunum og brennioljuavgjaldinum.

Vit halda nevniliga tað vit lova. Eisini í samgongu. Tí lækkaði skatturin _ milliard seinasta valskeið. Hvat hevur Fólkaflokkurin gjørt higartil? Onki.

Hvat hevði Sambandsflokkurin gjørt á hesum øki? Nógv.

Tað er púra vist, at um vit vóru í samgongu, so høvdu bæði skattir, benzin og diesel verið lægri enn vit siggja ídag. Okkara endamál er nevniliga, at føroyingurin skal fáa tað betri. Okkara endamál er at krevja skattir til at reka samfelagið í Ríkisfelagsskapi. Núverandi samgonga blæsir á føroyingin og dýkir hann undir í skattum. Teir síggja bert loysingina fyri sær. Og hana skulu hini gjalda – føroyingurin, ið longu nú rindar ov nógv.
Kemur Sambandsflokkurin í samgongu - so lækka skattirnir aftur - so einkult er tað.
Vit halda tað vit lova.
Men hetta málið um at lækka benzinavgjaldið er ov álvarsligt at skemta við. Benzinprísirnir mugu og skulu nevniliga lækkast. Næstu fer vóni eg, at samgongan ella partur av henni tekur undir við at lætta um hjá føroyingum á hesum øki.

Serliga rokni eg við, at Fólkaflokkurin ikki aftur fer at svíkja tað lyfti um lætta, ið teir góvu veljaranum til seinasta val. Tí higartil hava føroyingar bert sæð prís og skattahækkingar. Er tað ikki óetiskt, at halda føroyingin fyri tað turra spott - sjálvt eftir at 80 kanningin nú er kunngjørd?

Vónandi verða røtt og saklig tíðindi at verða borin fram á middegi næstu ferð í jan ella febr 2001, tá benzinprísirnir aftur koma fyri Løgtingið.

Teir skullu nevniliga lækkast!

# Einstaklingakapping í amboðsfimleiki

Leygardagin skipar Havnar Fimleikafelag fyri aðru einstaklingakappingini hendan veturin. Kl. 12 leygardagin 13. januar verður kappast í lop um hest.

Kappingin leygardagin er fyri gentur og dreingir, 14 ár og eldri. Hetta er onnur kappingin av trimum og spenningurin er nú í hæddini, hvør vinnur ymsu plássini samanlagt.

Fyrra kappingin var 16. desember. Tá luttóku Havnar Fimleikafelag, Ljósið og Støkk. Úrslitini eftir kappingina tá vóru hesi:

## Gentur - Bitið

| Bólkur 3 | Felag | Nr. | Stig | Nr. |
|---|---|---|---|---|
| Unn Krakesten | Ljósið | 9 | 7,45 | 1 |
| Mia Mortensen | Ljósið | 4 | 6,65 | 2 |
| Vanja Højgaard | Støkk | 7 | 6,65 | 2 |
| Elisabeth Jacobsen | Støkk | 1 | 6,6 | 4 |
| Ann Mari R. Johannessen | Støkk | 6 | 6,2 | 5 |
| Bjørg Danielsen | Ljósið | 2 | 5,45 | 6 |
| Elsa Helmsdal | Ljósið | 3 | 5,25 | 7 |
| Kristina Djurhuus | Ljósið | 8 | 5 | 8 |
| Hervør Heinesen | Støkk | 5 | 4,65 | 9 |

| Bólkur 4 | Felag | Nr. | Stig | Nr. |
|---|---|---|---|---|
| Súsan P. Olsen | Ljósið | 14 | 7,5 | 1 |
| Marina Moraites | HF | 13 | 7,45 | 2 |
| Marit Magnussen | Støkk | 11 | 7,4 | 3 |
| Duruta Knudsen | Støkk | 16 | 7,35 | 4 |
| Inga Thorkilshøj | HF | 20 | 7,35 | 4 |
| Anita Knudsen | Støkk | 21 | 7,25 | 6 |
| Marjun Persson | HF | 15 | 7,2 | 7 |
| Sólrun Michaelsen | HF | 17 | 6,35 | 8 |
| Sarita Heinesen | Støkk | 19 | 6,3 | 9 |
| Vígdis Hentze Olsen | Ljósið | 12 | 6,15 | 10 |
| Anna Hansen | Støkk | 10 | 5,95 | 11 |
| Birita Nielsen | Ljósið | 18 | 5,85 | 12 |

## Dreingir - Ringar

| Bólkur 3 | Felag | Nr. | Stig | Nr. |
|---|---|---|---|---|
| William Holm Jacobsen | HF | 22 | 8,2 | 1 |
| Knút Jarnskor | HF | 23 | 8 | 2 |

**Dreingir - Ringar**

| Bólkur 4 | Felag | Nr. | Stig | Nr. |
|---|---|---|---|---|
| Høgni R. Øster | HF | 28 | 9,25 | 1 |
| Eyvind A. Hansen | HF | 27 | 9,2 | 2 |
| Høgni H. Andersen | HF | 26 | 9 | 3 |
| Tórarin Holm Petersen | HF | 25 | 8,75 | 4 |
| Heini í Dali | HF | 24 | 8,7 | 5 |

**12. Sending**

## Kálvssneið á grill ella pannu

**Hetta skalt tú brúka:**
600 gr. av kálvssneið skorin í flísar
150 gr. av osti, sum kann bráðna
3 spsk. av karvaðari persillu
1 tsk. av oregano
1 hvítleyksbát
Saft frá einari sitrón
Rasp
Salt og pipar
2 spsk. av rosinum
2 spsk. av pinjukjarnum

**Soleiðis gert tú:**
1. Banka flísarnar heilt tunnar við kjøthamari
2. Legg pinjukjarnurnar, rosinur, ost, salt og pipar á kjøtið
3. Rulla saman og set 2-3 rullur á hvørt spjótið
4. Vend rullurnar í raspi
5. Steik rullurnar í 5 min. á hvørjari síðu
6. Smyr rullurnar, við jøvnum millumbilum, við oljublandi rørt saman av olju, persillu, sitrónsaft, oregano, hvítleyki, salti og pipari.

Avlopið frá oljublandinum kann stoytast omaná tað liðugt stokta kjøtið.

## Farserað kalkunbringa

**Hetta skalt tú brúka:**
1 kalkunbringu
2 egg
2 pk av beykon
1 pk. av róma

**Soleiðis gert tú:**
1. Sker endarnar av bringuni og koyr teir í hvirluna. Koyr salt í og rør til hetta er sogt.
2. Koyr síðani eggini í – eitt í senn.
3. Síðani verður rómi stoyttur í.
4. Krydda við salti og pipari
5. Legg beykonið flatt og smyr deiggið á.
6. Legg síðani kalkunbringuna á og rulla saman.
7. Ansa eftir, at deiggið er rundanum alt bringustykki
8. Steik í ovni í 20-30 min. á 184 stigum.

**Sósin**
Beykon
leykur
Høsnasoð
Estragon
Rómi

1. Sker beykon í smáar bitar
2. Brúnka leykin í einari grýtu
3. Stoyt høsnasoðið í – lat kóka
4. Koyr síðani róman og estragon í.
5. Ger út á við maisena.